# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Um 20 ár fer tað ikki at bera til at gera kavamenn í Skandinavia, tí tá verður eingin kavi*

*svenskur veðurmaður*

# Eingin kavi um 20 ár



**Um 20 ár verður eingin kavi í Skandinavia. Í Alpunum hevur tað ikki verið so lítt í 1300 ár**

Halda verandi veðurlagsbroytingar fram, verður eingin kavi í Noregi og Svøríki um 20 ár. Tað sigur svenski veðurmaðurin Pär Holmgren. Hann vísir á, at tey seinastu árini er kavin í fjøllunum minkaður nógv, samstundis sum kavamarkið fer longri og longri norðureftir.

- Hetta er tað besta prógvið fyri, at vit skulu venja okkum við eitt lýggjari veðurlag, sigur svenski veðurmaðurin við blaðið Expressen. Hann leggur afturat, at norðmenn og sviar kunnu kanska vænta sær kaldar vetrar tey næstu 10 - 20 árini, men at teir verða færri, enn teir hava verið.

- Kavin verður ikki liggjandi uttan so, at tað er kalt, men uttan kava fáa vit ikki rættiligan kulda, sigur Pär Holmgren. Hann er so vísur í síni søk, at hann væntar ikki, at sviar kunnu hátíðarhalda 100 ára dagin hjá teirri kendu Vasaskíðkappingini, sum annars eigur at vera í 2022.

### Eisini í Alpunum

Tað er ikki bara á okkara leiðum, at tað er óvanliga lýtt. Soleiðis er eisini í Alpunum.

- Hetta er tað lýggjasta tíðarskeiðið í Alpunum tey seinastu 1300 árini, sigur eysturríkski veðurlagsgranskarin Reinhard Bøhm. Hann stendur á odda fyri einari ES-kanning, sum gjørdi ymsar mátingar í tíðarskeiðinum frá mars í 2003 til august í ár. Málið var at kanna, hvussu veðurlagið hevur verið í Alpunum tey seinastu túsund árini.

Sambært eysturríkska granskaranum byrjaði tað lýggja veðrið í Alpunum í áttatiárunum. Hann sigur, at tað vóru eisini tíðarskeið við lýðku í 10. og 12. øld, men tá var kortini ikki so lýtt sum nú.

Sjálvur ivast Reinhard Bøhm ikki í, at tað er menniskjan, sum hevur ávirkað veðurlagið. Hetta byrjaði í fimmtiárunum, sigur hann, og síðani áttatiárini hava vakstrarhúsgass so sum karbondioxin og metan hitað atmosferuna. Hann ivast ikki í, at tað verður uppaftur lýggjari í framtíðini.

Tað lýggja veðrið kemur teimum nógvu frítíðarplássunum í Alpunum illa við. Nógvastaðni er eingin kavi komin niður, og kend frítíðarpláss sum St. Anton og Arlberg hava verið noydd at ta vanligu skránna. Harafturat er tað so lýtt, at tað ber heldur ikki til at brúka eftirgjørdan kava.

Um stutta tíð verður ein stór skíðkapping í Tyrol, og fyrireikararnir noyddust niðan á hægsta fjallið í Eysturríki, Grossglockner, eftir 7.000 tonsum av kava, so kappingin kann haldast.

## STUTT SAGT

### Gamli ávirkar

Tað hevur verið hildið, at George W. Bush, forseti, fær hjálp og góð ráð frá pápa sínum, George H. W. Bush, sum var amerikanskur forseti frá 1989 til 1993. Men so er ikki, sigur tann yngri bið BBC. Fleiri amerikanskir fjølmiðlar vilja kortini vera við, at tann eldri hevur stóra ávirkan á tann yngra. Tá forsetin fyri stuttum valdi sær Robert Gates til verjumálaráðharra, varð víst á, at Gates var CIA-ovasti undir tí eldra Bush. Hetta sama endurtók seg, tá forsetin bað James Baker standa fyri at kanna støðuna í Irak. Baker var uttanríkisráðharri hjá Bush eldra.

### Einki jólapynt

Tríggir fjórðingar av arbeiðsplássunum í Bretlandi pynta ikki til jóla, tí tey bera ótta fyri, at tað kann kennast stoytandi fyri tey, sum hava aðra trúgv enn ta kristnu. Tað vísir ein kanning. Hon vísir eisini, at fleiri halda tað vera óhóskandi at hava jólapynt á skrivstovum, tí tað tekur dámin av skrivstovunum sum verulig arbeiðspláss. Bretskir kirkjuleiðarar hava ávarað fólk og fyritøkur ímóti at avkristna jólini, tí tað kann fáa fólk at seta seg upp ímóti eitt nú muslimunum í Bretlandi.

### Hon er prinsessa

Løgreglan í Bergen í Noregi er komin í rasshaft av einari ungari kvinnu. Kvinnan sigur, at hon eitur Anastasia Jerusalem, og at hon er prinsessa. Kvinnan tosar enskt og spanskt, men løgreglan veit ikki, hvørjum landi hon er úr. Kvinnan varð fyrstu ferð tikin í Oslo í summar, og síðani 6. november hevur hon verið í Bergen. Løgreglan hevur nú biðið almenningin um hjálp fyri at fáa greiði á, hvør Anastasia Jerusalem veruliga er.

# Eldrabylgjan verður størri enn hildið

Í Danmark hækkar livialdurin nógv skjótari, enn roknað varð við fyri bara fáum árum síðani, og tað gevur størri fíggjarligar trupulleikar.

At fólk liva longri ger, at tað verða uppaftur fleiri eldri samanborið við fólk í arbeiðsførum aldri. Tað er niðurstøðan í einari frágreiðing, sum teir óheftu búskaparvísmenninir í Danmark løgdu fram fyrr í vikuni.

Formaðurin í vælferðarnevndini hjá stjórnini, professarin Torben M. Andersen, gevur vísmonnunum rætt.

- Vit vóru helst ov varnir, tá vit gjørdu okkara metingar. Tað, sum vit væntaðu fór at koma um nøkur ár, kemur fyrr, enn vit mettu, og tað ger teir fíggjarligu trupulleikarnar so mikið størri, sigur Torben M. Andersen við JyllandsPostin.

Í einari roynd at tálma avleiðingunum av eldrabylgjuni hevur Fólkatingið broytt aldursmarkið fyri, nær fólk kunnu fara frá við eftirløn, samstundis sum fólkapensjónsaldurin verður hækkaður. Tað hendir frá 2019 til 2027, soleiðis at tá verður eftirlønaraldurin 62 ár og fólkapensjónsaldurin 67.

Stórt úrval av leysamotorum.
Ring til okkara!




STUBBIN
Fjarðarvegur 12, 350 Vestmanna
Tlf. 471 800 / 218 540